# Møguleiki fyri BP/Shell samstarvi á Atlantsmótinum

**Eydnast tað BP at fáa tað leitiloyvi, sum tað hevur søkt um í bretskum øki skamt frá føroyska markinum, so stendur tað Shell í boði at koma uppí loyvini hjá BP bæði í føroyskum og bretskum øki. Hetta kann fáa stóran týdning fyri menningina av Atlantsmótinum sum nýtt oljuøki**



*Peter Rattey, BP-stjóri sær fegin, at Shell verður við í leitingini á føroyskum og bretskum øki.*

Mynd Jan Müller

OLJUSAMSTARV

*Jan Müller*

Á høvuðsskrivstovuni hjá BP í Bretlandi leggja tey stóran dent á alt Atlantsmótið tvs. bæði føroyska økið og bretska økið hinumegin markið. Tað er so heldur eingin loyna, at tá BP fóllkini umrøða framtíðar møguleikar og vónir til alt hetta stóra og nýggja økið, sum av summum longu verður kallað »Tann nýggi Norðsjógvurin«, so fevnir tað um eina ætlan við nógvum framleiðslubrunnum á bæði føroyskum og bretskum øki sum allir so ella so verða bundnir í eina ella aðra infrastrukturskipan, rørleiðing.

Peter Rattey, stjóri sigur, at teir ætla sær at bora sín fyrsta brunn við West Navion á føroyskum øki í august og vónandi stutt eftir tað at kunna bora ein brunn beint hinumegin markið. Men tað veldst so um, hvat BP fær tilluttað í tí 19. útbjóðingini. Og BP -stjórin dylur ikki fyri, at teir eru sera spentir, hvat teir fáa. Teir hava bjóðað uppá eitt øki, sum eftir øllum at døma minnir um prospektið Svínoy á føroyskum øki. – Fáa vit teigin vit hava søkt um á bretskum øki, so hava vit tvey rættiliga góð og meinlík prospekt báðumegin markið, og tað eru hesi bæði vit vilja bora í longu í heyst. Peter Rattey heldur, at tað kann vera ein stórur fyrimunur, um teir kunnu bora bæði í føroyskum og bretskum øki – hvør sínu megin markið í heyst.

Í løtuni hevur BP samráðingar við Shell, sum hevur víst áhuga fyri at koma innaftur á Atlantmótið tvs. bæði í føroyskt og bretskt øki. Peter Rattey sigur, at BP leingi hevur havt sera gott samstarv við Shell á djúpum vatni og tí eru bæði feløgini tey røttu til at arbeiða á eitt nú Atlantsmótinum við tess stóru dýpum og tøkniligu avbjóðingum.

Fyri tveimum árum síðani gjørdi Shell av at taka sær úr økinum millum Hetland og Føroyar. Nú hevur felagið kortini víst áhuga fyri økinum av nýggjum. Sosialurin skilur, at Shell tíðliga í juni fer at taka eina avgerð um, antin felagið aftur skal fara at brúka pengar og orku til leiting og framleiðslu á Atlantsmótinum.

*– Men fáa tit tað loyvið, sum tit eru úti eftir á bretskum øki, merkir tað so, at Shell verður við aftur?*

– Eg kann ikki svara fyri Shell, men vit hava latið teir vita, at eru teir hugaðir at verða við aftur á Atlantsmótinum, so eru teir vælkomnir, men so skulu teir vera við í báðum loyvum, tvs. tí sum vit longu hava í Føroyum og tí sum vit vóna at fáa í bretskum øki. Eg hevði sett ómetaligan prís uppá at sæð hesi bæði prospektini útviklað í senn, og tess einfaldari eigaraviðurskiftini eru í báðum loyvunum tess betri.

Peter Rattey sigur, at tað hevði havt stóran týdning at fingið Shell við í arbeiðið á Atlantsmótinum, tá man hugsar um, hvussu drúgvar royndir felagið hevur á djúpum vatni aðrastaðni. Ger Shell av at gerast partur av BP-loyvunum, har BP framhaldandi verður operatørur, so skilur Sosialurin, at Shell fer at verða drigið nógv uppí arbeiðið og fer at vera virkin partnari bæði í føroyska og bretska økinum.

*– Men er góður møguleiki fyri, at Shell kemur við?*

– Eg vóni, at teir gera tað, men avgerðin liggur hjá teimum.

Peter Rattey heldur tað eisini hevði kunnað verið eitt stórt framstig fyri oljuleiting við Føroyar, um Shell var við aftur. Tí við BP og Shell, sum hava drúgvastu royndirnar av øllum oljufeløgum at leita og framleiða á djúpum vatni, kann eitt nýtt øki sum tað føroyska heysta ágóðan. Allir partar fara at fáa ágóðan av einum samstarvi millum BP og Shell sigur BP-stjórin og leggur aftrat:

– Tað er eingin ivi um, at fáa vit Shell við okkum í slíkum loyvum, so fer tað at gera okkum nógv sterkari. Men Shell má sjálvt taka eina avgerð. Vit í BP vóna, at teir vilja vera við, men vit hava ongar ætlanir um at leggja trýst á teir.

*– Tú virkar so bjartskygdur!*

– Tað eru vit eisini, og tað er tí, at vit eru so vissir um, at hetta fer at eydnast. Hyggur tú eftir einum landakorti og sær hvar BP arbeiðir, so kann eg vissa tykkum um, at tað vit gera við Føroyar er nakað av tí besta og mest týdningarmikla, sum BP ger nakra staðni í verðini í løtuni. Royndirnar vísa eisini, at har vit eru serliga vissir um at finna olju, har hava vit eisini havt eydnuna við okkum. BP hevur lagt seg eftir at leggja alla orku í at fáa eitt gott úrslit so tíðliga sum gjørligt í einum slíkum lovandi øki sum Føroyum sigur BP-stjórin. Fær BP umrødda loyvi í bretskum øki er ætlanin at fara við West Navion í bretskt øki at bora aftaná boringina við Føroyar í heyst. (Henda samrøðan varð gjørd beint áðrenn útslitið av 19. rundu í bretskum øki varð kunngjørt í gjár, blaðm.)

# Strangari umhvørviskrøv

OLJULEITING

*Jan Müller*

Tað verða sett munandi strangari umhvørviskrøv til oljufeløgini, sum ætla sær at leita eftir olju og gass í bretskum øki á Atlantsmótinum, nú loyvini í 19. umfarinum verða latin feløgunum. Bretski orkumálaráðharrin Peter Hain kunngjørdi í gjár, hvørji feløg fáa tillutað leitiloyvi í bretska partinum av tí Hvíta økinum, skamt frá føroyska markinum. Í hesum sambandi gjørdi hann greitt, at feløgini skulu halda seg til tey nýggju krøvini og reglurnar til umhvørvi, sum koma at galda fyri leitivirksemi í hesum økinum. Talan er um strangari reglur fyri at verja djór og umhvørvi annars. Her er m.a. talan um hval, delfinir og ikki minst viðhvamar og sjáldsamar partar av náttúruni. Eisini verða serstøk krøv sett til seismiskar kanningar, rørleiðingar og avtøku av útbúnaði. Peter Hein sigur, at hóast oljuvinnan skapar stór virði til samfelagið, so má øll menning og útbygging verða gjørd við skilagóðum atliti til og virðing fyri umhvørvinum.

# Amerada Hess gott hál

OLJULEITING Í BRETSKUM ØKI

*Jan Müller*

– Vit eru sera væl nøgdir við úrslitið av útbjóðingini í bretskum øki. Hetta vísir, at Amerada Hess prioriterar Atlantsmótið sera høgt, og at vit við loyvum okkara báðu megin markið standa sera sterkir í hesum økinum sigur ein sera fegin stjóri í føroyska partinum av Amerada Hess, Ben Arabo, nú úrslitið av 19. útbjóðingini í bretska partinum av Hvíta økinum er kunngjørt.

Amerada Hess er eftir øllum at døma stóri vinnarin av útbjóðingini og hevur fingið tilsamans fýra leitiloyvi, har tað er operatørur í øllum. Hini feløgini, sum eru við, eru tey somu, sum Amerada arbeiðir saman við á føroyskum øki, tvs. BG og Dong. Í einum loyvi arbeiðir Amerada saman við Texaco, sum má sigast at vera hin stóri vinnarin av útbjóðingini. Texaco, sum einki loyvi fekk í føroyskum øki, er við í fýra loyvum, harav tað er operatørur í trimum. Annars hevur BP saman við Shell fingið eitt loyvi. Phillips stendur fyri einum loyvi saman við partnarunum frá føroyaøkinum, Statoil og Veba. Tað, sum annars er vert at bíta merki í, er, at danska felagið Dong hevur fingið tillutað eitt loyvi saman við OMV umframt at vera við í hinum trimum av loyvunum hjá Amerada Hess. Í Dong-høpi er hetta einki minni enn ein lítil kolvelting, tí felagið hevur sett sær fyri at fáa operatøruppgávu uttan fyri danskt øki. Eisini fyri BP er útbjóðingin kærkomin. Hjarnar Djurhuus, stjóri hjá BP í Føroyum sigur, at BP er sera væl nøgt við úrslitið av útbjóðingini. Shell er við í loyvinum, og fer hetta eftir øllum at døma at hava við sær, at Shell eisini verður partnari hjá BP í føroyskum øki.

Feløgini, sum hava fingið tillutað leitiloyvi, hava bundið seg til at bora í minsta lagi sjey brunnar í bretska partinum av Hvíta økinum, sum bretski oljumálaráðharrin umrøður sum »an area which has world class potential for significiant petroleum discoveries«, tvs. eitt øki, hvørs møguleikar at gera verulig oljufund, er í heimsflokki. At tað verða boraðir sjey brunnar ímóti átta brunnum í føroyska økinum, sum er nógv minni, vísir, hvussu hørð kappingin er. Samanumtikið kunnu henda bretska útbjóðingin fáa stóran týdning fyri leitingina og møguliga framleiðslu á føroyska landgrunninum eisini.




*Vit síggja teigarnar í 19. umfari, sum allir liggja tætt upp at føroyska markinum. Amerada Hess hevur fingið teigarnar: 176/20 (saman við BG og Dong), 204/9 (saman við Texaco) 204/16 (saman við BG og Dong) og 204/21 (saman við BG og Dong). Texaco hevur fingið: 204/17 (saman við Conoco og EDC), 213/5 (saman við Intrepid Energy), 213/26,27 (einsamalt) og saman við Amerada 204/9. BP hevur saman við Shell fingið 204/18. Phillips 176/25 (saman við Statoil og Veba). Dong hevur fingið 204/10 (saman við OMV).*